


## 137 umsóknir til 48 pláss

Tilsamans 137 vilja verða antin lærari ella pedagogur. Tað er greitt, nú umsóknarfreistin til Føroya Læraraskúla er farin. Tá ið freistin at søkja var úti vóru 67 umsóknir til læraraútbúgvingina og 70 til pedagog. 24 sleppa inn á hvørja útbúgving, og umsøkjararnir fáa svar í fyrstu viku í juli. Í ár eru fleiri umsóknir enn í fjør. Tá freistin at søkja í fjør var úti, vóru 109 umsóknir. Tá varð gjørt av at leingja freistina til á Ólavsøku, og nakrar umsóknir komu afturat. Í fjør vórðu 48 tikin inn á hvørja av teimum báðum útbúgvingunum, og tey vórðu liðug við 1. árs lestur eftir royndarskipan í síðstu viku.

## Tórshavnar kommuna keypir ogn fyri 17 milliónir

Tórshavnar býráð viðgjørdi í gjár málið um keyp av ognunum við Niels Finsensgøtu 7, har býarbókasavnið og onnur halda til. Býráðnum stóð í boði at keypa bygningin fyri 17 milliónir krónur, og Norðoya Sparikassi, sum eisini eigur sp/f Heim, ið eigur og rekur bygningin, hevði boðið sær at læna kommununi 15 milliónir krónur til keypið. Einmælt samtykti býráðið at keypa bygningin við figging úr Norðoya Sparikassa á 15 milliónir og við at fíggja restina av einum av kontum býráðsins. Ætlanin við bygninginum er at Býarbókasavnið skal hava alt sítt virksemi í ognunum, tó verða hølini, sum Joto var í leigaði út til handil.

# Keldan skipar skúla



**Um eitt ár er ætlanin, at fyrstu næmingarnir byrja í fyrsta flokki í Kelduni í Skálabotni. Men fleiri loyvi skulu upp á pláss, áðrenn klárt verður at byrja**

SKÚLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Um loyvini frá Mentamálaráðnum koma upp á pláss, so fara fyrstu børnini í forskúla og fyrsta flokk í skúlanum í Kelduni í Skálafirði í august 2010.

- Vit eru í ferð við fyrireikingararbeiðið, sum skal til fyri at skúlin kann blíva góðtikin og fáa neyðugu loyvini frá Mentamálaráðnum. Vit hugsa um at byrja við einum forskúlaflokki og einum fyrsta flokki. Síðani vil tað verða ein náttúrligur vøkstur hvørt ár. Í fyrstu atløgu hugsa vit upp til sjeynda flokk, sigur Jastrid Høj, sum er ein av fyrireikarunum til skúlan, sum eftir øllum at døma byrjar í august 2010.

### Grundarlag fyri skúlan

Skúlin verður inni í einum parti av Kelduni, sum er gjørdur til endamálið. Og tað er kristna trúgvin, sum verður grundarlagið.

- Tann kristna trúgvin verður virðisgrundarlagið, sum skúlin skal byggja á. Okkara visjón er at stuðla kristnum foreldrum í teirra ábyrgd at læra, venja, vegleiða og uppala teirra børn. Og Skúlin verður ein forlongdur armur av ábyrgdini, sum foreldur hava fingið av teirra børnum, greiðir Jastrid Høj frá.

Hon leggur afturat, at tey vilja byggja ein skúla, sum er við til at menna næmingarnar fakliga, sálarliga, likamliga, andaliga og í samspæli við onnur. Tey leggja eisini stóran dent á, at skúlin skal at byggja á eitt fakligt høgt støði, men hon greiðir frá, at mátin at undirvísa fyri at náa tað, er ikki liðugt fyrireikaður enn.

### Hava rætt til skúlan

Fyrireikararnir av skúlanum eru eisini sannførdir um, at ongin hevur rætt at steðga teimum at skipa skúlan.

- Í grein 26 í heimsyvirlýsingini hjá ST um mannarættindi stendur millum annað at »Foreldur hava rætt til at velja tann skúlan, børn teirra skulu ganga í.« Við øðrum orðum, rætturin at velja ta undirvísing, sum skal gevast til barnið, tilkemur fyrst og fremst foreldrunum. Henda rætt og hetta val vilja vit verða við til at geva foreldrum í Eysturoynni og øðrum, sum eru áhugaði, staðfestir hon.

### Næmingarnir

- Frískúlin Keldan vil vera við til at venja og uppala næmingarnar til at vera tryggar, glaðar, sjálvstøðugar og væl upplýstar persónar, sum hava eina positiva ávirkan á sítt nærumhvørvi og eru við til at ávirka í samfelagnum, sigur Jastrid Høj.

Í sama viðfangi leggur hon afturat, at skúlin fer at arbeiða málrættað við karakterbygging. At ætlanin er at venja næmingarnar til at síggja týdningin av einum kristnum atburði. Og at børnini skulu læra at taka ábyrgd fyri sínum avgerðum og læra at síggja avleiðingarnar. Hetta umfatar ymiskar dygdir sum millum annað at vera álítandi, takksamur, lýðin, at hava virðing, tol, tolsemi og at geva.

### Lærararnir

Sambært fyrireikarunum er fyrsta fyritreytin, at lærararnir skulu hava útbúgving, so teir eru skikkaðir at undirvísa á skúlanum, men tað er eisini eitt krav, at lærararnir kenna visiónina fyri skúlan og taka undir við henni fyri at kunna arbeiða á skúlanum.

### Vísind og Gud

Ein spurningur, sum altíð er, tá skúlar, ið eru bygdir á Gud verða gjørdir, er, hvussu verður við undirvísing í lívfrøði og serliga um evolutión. Skúlin hevur eina greiða hugsan um hetta.

- Skúlin vil eggja næmingum at seta spurningar til alt millum himmal og jørð og at hugsa sjálvstøðugt. Sjálvsagt skal næmingurin hava undirvísing um evolutión, men hann má eisini hava frælsi at seta spurningar her. Tað eru nógvir professarar innan náttúruvísundaliga økið, ið seta spurningar við hetta, og hetta eigur næmingurin eisini at fáa at vita, greiðir Jastrid Høj frá.

Hinvegin eru tey ikki komin so langt, at tey hava fyrireikað tilfarið til ymisku lærugreinirnar, men tey ætla at nýta nógv tilfar, sum almenni fólkaskúlin eisini nýtir.

### Raðfesta kirkjusøgu

- Vit ynskja at undirstrika, at skúlin kemur at halda seg til lesiætlanir og annars allar reglur, ið myndugleikarnir áleggja, sigur Jastrid Høj.

Hon leggur afturat, at í skúlanum í Kelduni er ætl-